# Úr B36 til EB/Streym

**Nú Piotr Krakowski tekur við sum venjari hjá EB/Streymi hevur hann fingið tveir av fyrrverandi leikarum sínum við sær**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eins og flest onnur feløg, so ætla tey í EB/Streymi at gera sítt til, at úrtøkan í komandi kappingarárið skal betrast nakað í mun til í fjør.

Tað hevur verið frammi fyrr, at Marek Wierzbicki eftir eina fortíð í fleiri føroyskum feløgunum nú skal taka eitt tørn saman við manninum, sum av fyrstan tíð fekk hann til føroyskan fótbólt, og nú er greitt, at EB/Streymur eisini fær tilgongd av tveimum øðrum leikarum. Egil á Bø (fyrr Zachariasen) og Magni á Lakjuni hava báðir tveir verið partur av B36-hópinum seinnu árini, men komandi árið verður tað í EB/Streymi, at teir fara at spæla.

### Ov lítið av tíð

Og í báðum førum tykist tað vera krøvini, sum vera sett einum felagi, sum vil gera seg galdandi í oddinum, sum tykjast vera beinleiðis orsøkin til skiftið. Báðir siga leikararnir í øllum førum, at teimum hevur dámt sera væl tíðina í B36, men at teir í løtuni ikki hava stundir at røkja venjingarskyldurnar í B36.

- Sjálvur eri eg byrjaður at lesa HD, og tá eru snøgt sagt ikki stundir til at vera tøkur ávísa klokkutíð fimm til seks ferðir um vikuna. Eg skal ikki siga, at venjingin er lættari hjá EB/Streymi, men eg havi fingið eitt sindur leysari teymar, enn eg annars vildi havt, og tí havi eg gjørt av at skifta, sigur Egil, og Magni á Lakjuni gevur eisini á leið somu orsøkir til sítt skifti.

Hartil er tað eisini galdandi fyri Egil á Bø, at hann við hesum vendir aftur til barndómsfelagið. Og spurdur beinleiðis um hetta, sigur hann eisini, at tað so avgjørt hevur havt sína ávirkan.

- Tað sigur seg sjálvt. Nú er tað sjálvandi nakað síðani, at eg seinast spældi við teimum, men sjálvandi hevur tankin nortið við meg av og á. At skula venda aftur til barndómsfelagið.


Nú Andrzej Pacek og hinir úr EB/Streymi eru farnir undir aftur venjingarnar, hevur felagið fingið tilgongd av nøkrum nýggjum andlitum

### Sterkur hópur

Og nógv bendir á, at tað verður eitt hampuliga væl mannað lið, sum EB/Streymur fer at hava komandi árið. Umframt Teir báðar nýtilkomnu telir hópurin eisini sum nevnt Marek Wierzbicki, og so er tað eisini so, at fleiri leikarar, sum áður hava verið burtur frá felagnum seinnu árini aftur hava funnið røtur sínar aftur. Her verður hugsað um leikarar sum Ronnie Samuelsen, Jákup Martin Joensen og Inga Hansen. Alt í alt ein sera spennandi blanding, sum saman við restini av hópinum fara at taka kappingina upp við hini liðini í deildini, og uttan iva er vónin, at teir hesa ferð koma at skapa enn meira órógv í ovaru røðunum, enn teir hava gjørt tey bæði seinnu árini.

## Ein kanónbólkur

**GÍ, HB og B36 endaðu øll í sama bólki, tá lutur varð kastaður um bólkarnar í steypakappingini**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Fríggjadagin varð lutur kastaður um, hvussu spælast skal, tá farið verður undir ársins útgávu av kappingini um løgmanssteypið.

Sum vant, so verður aftur í ár kappast í trimum bólkum, har fýra lið eru í hvørjum. Fyri at fáa kabalina at ganga upp, verða tó fyrst nakrir undankappingardystir, har veikast styrkismettu liðini skulu spæla um pláss í bólkaspælinum.

Í ár verða hesir undankappingardystir leiktir soleiðis. 8. og 9. mars spæla TB-Fram, LÍF-Royn, ÍF-AB og B71-Sumba. Vikuskiftið eftir hetta spæla so vinnarnir av hesum dystum so endaliga undanumfarið til bólkarnar soleiðis: TB/Fram-LÍF-Royn og ÍF/AB-B71/Sumba.

### Kanónbólkur

Sjálvt bólkaumfarið í steypakappingini verður leikt 22. mars til 23. apríl. Her vórðu liðini somuleiðis styrkismett, soleiðis at fremstu liðini í fjør ikki kundi koma í sama bólk. Tað forðar tó ikki fyri, at onkur av bólkunum vera sera sterkir á pappírinum. Ikki minst tí talið av lium ger, at tað altíð vilja vera fýra fyrstudeildarfeløg í einum bólki.

Í ár gjørdist tað bólkur trý, sum á pappírinum varð tann sterkasti. Meistararnir úr HB skulu her spæla ímóti grannunum og ivaleyst gullfavorittunum úr B36, siðvandu gøtumonnunum, sum altíð kunnu geva øllum ein skarpan gang og so Skála, sum avgjørt má metast sum lítla liðið í hesum sambandinum.

Í hinum báðum bólkunum tykjast KÍ og NSÍ at vera greiðir favorittar, tó at ávíkavist VB og B68 ivaleyst vilja kappast við, eins og tað verður spennandi at fylgja FS Vágum og EB/Streymi.

Bólkarnir í steypakappingini gjørdust sostatt hesir:

**Bólkur 1**
NSÍ
B68
FS Vágar
B71, ÍF, Sumba ella AB

**Bólkur 2**
KÍ
VB
EB/Streymur
TB, LÍF, Royn ella Fram

**Bólkur 3**
HB
GÍ
B36
Skála

## FCK styrkir verjuna

**Felagið skal helst leita eftir nýggjum áleypara fyri Toda Jónsson, men fyri fyrst tykjst teir hava styrkt um sterkastu verjuna í landinum**

SUPERLIGA
*Jákup Mørk*

Síðani tað gjørdist greitt, at hvørki Todi Jónsso ella Rune Pedersen fóru at leingja um sáttmálar sínar við FCK, hevur nógv verið tosað í donsku miðlunum, hvørjar leikarar FCK fór at fáa í felagið ístaðin.

Á málverjasessinum hevur ikki verið so nógv at hoyrt, og tó at tað heldru ikki hava verið so nógv álopsnøvn nevnd, so hevur okkurt verið tosað um ein evnaríkan ungan argentinskan áleypara.

Hinvegin tykist FCK nú brádliga at hava styrkt um aðrar partav av verjuni. Framman undan er lítið at ivast í, at verjuparturin á liðnum er hin sterkasti í Danmark, og nú er so líkt til, at liðið verður enn betri fyri í so máta.

Mánadagin skuldi FCK væntandi gera avtalu við fyrrverandi danska landsliðsleikaran, Ole Tobiasen. Tobiasen spældi í FCK, áðrenn hann á sinni varð seldur til Herenveen. Har gekst somikið væl, at Ajax gjørdi av at keypa hann, og her fekk hann veruliga gjøgnumbrot sítt.

Tríggir fylgjandi krossbandsskaðar í knænum gjørdu tó sítt til, at talan gjørdist um alt ov fáar dystir í Ajax, og grundað nógvu skaðarnar vildi felagið ikki leingja sáttmálan við leikaran, og hevur hann tí í eitt ár spælt við AZ Alkmaar, haðani FCK nú hevur keypt hann.

Ole Tobiasen er í dag 27 ára gamal, og kann spæla bæði í miðverjuni og á høgra bakki, og so er spurningurin, hvar Hans Bäcke fer at gera nýtslu av honum.



# Havnarmenn á odda

**Liðkappingin er nú hálvrunnin, og bert eitt stig skilur fýra tey fremstu liðini. Vestmenningar hava tað hinvegin torført í botninum**



TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Ógjørligt er at geva eitt beinrakið boð um nakran FM-favoritt. Teir úr Havnini hava sjálvsagt fyrimun framum hini liðini við eittstigar-leiðsluni, men heili trý lið liggja og lúra lið um lið upp til havnarmenn. Hesi eru liðini úr hvalvík, klaksvík og av toftum.

Í Havn vann heimaliðið í vikuskiftinum 3-1 á kollfirðingum. Fyrsta borðið hjá HT, Martin Poulsen, var burturstaddur, og tí røkti Olaf Berg fyrsta borð. Útisetin, Rógvi W. Rasmussen, sum er heima í hesum døgum, mannaði annað borð hjá havnarmonnum.


Fyri Klaksvíkar Talvfelag gjørdi Ólavur Simonsen bart, tá hann vann á John Rødgaard

Olaf megnaði ikki uppgávuna móti Hans Kristian Simonsen, men Rógvi vísti seg at vera góður fongur tá hann vann eitt drúgvt talv á Torbjørn Thomsen. Úrslitið 3-1 eiga havnarmenn at vera nøgdir við. Kollfirðingar eru nú dragnaðir eitt petti frá toppinum.

Klaksvíkingar komu sterkt aftur í oddastríðið eftir góðan 3-1 sigur á vestmenningum. Ólavur Simonsen gjørdi bart og vann á IM John Rødgaard. Ein góð uppreisn hjá Ólavi eftir keðiligu kappingini í Norra herfyri. Talvið er við í blaðnum í dag.

Rani Nolsøe leikti skeivt tíðliga í byrjanarspælinum og hetta gjørdi John Jacobsen sær dælt av og vann eitt stutt talv. Sigurin gav klaksvíkingum eitt deilt annað pláss. Nú má nærum eitt undur til, um vestmenningar skula klára at halda seg uppi í ovastu deildini.

### Jens Kristian hansen - fimm av fimm

Uppgerðin millum hvalvíkingar og toftamenn endaði uttan nakran vinnara. Enn einaferð bleiv tað Jens Kristian Hansen sum varð álitið hjá toftamonnum. Hann vann sín fimta sigur á rað (!), hesaferð á Finnbjørn Zachariassen. Sámal Christiansen hevur eisini roynst væl í ár, og vann hann sunnudagin á Wenzil Højgaard.

2-2 munna bæði liðini vera hampiliga vælnøgd við.

Komandi umfar vera tveir toppdystir á skránni, nevnliga millum Havnarmenn og hvalvíkingar, og toftamenn og klaksvíkingar.

### 2. deild — tvey lið bróta frá

Kappingin um uppflyting stendur millum Runavíkingar og sandavágsmenn. Tað er greitt nú kappingin er hálvrunnin. Møguliga kunna klaksvíkingar hanga í, men tað er at kalla veruleikafjart. Runavíkingar eru hálvt stig fremstir, og tí verður tað ein sonn finala tá liðini hittast í seinnu helvt.

**1. deild - 5. umfar**

| Heima | Úti | Stig |
|---|---|---|
| **HT** | **KT** | **3-1** |
| Olaf Berg | Hans Kristian Simonsen | 0-1 |
| Rógvi W. Rasmussen | Torbjørn Thomsen | 1-0 |
| Herluf Hansen | Eyðálvur Johannesen | 1-0 |
| Haldur Suni Johansen | Grettir Djurhuus | 1-0 |
| **VT** | **KTF** | **1-3** |
| John Rødgaard | Ólavur Simonsen | 0-1 |
| John Jacobsen | Rani Nolsøe | 1-0 |
| Kári Durhuus | Finnbjørn Vang | 0-1 |
| Jákup á Rógvi Andreasen | Tummas M. Anthoniussen | 0-1 |
| **TFS** | **TT** | **2-2** |
| Martin Brekká | Bogi Ziska | 0,5-0,5 |
| Finnbjørn Zachariassen | Jens Christian Hansen | 0-1 |
| Sámal Christiansen | Wensil Højgaard | 1-0 |
| Gunnar Joensen | Helgi Joensen | 0,5-0,5 |

**Støðan**

| Lið | Stig |
|---|---|
| 1. HT | 12 |
| 2. TFS | 11 |
| 3. KTF | 11 |
| 4. TT | 11 |
| 5. KT | 9,5 |
| 6. VT | 5,5 |

## Talvini hesa vikuna

Fremsti kvinnuligi telvarin í heiminum, Judit Polgar, hevur síðani seinasta summar telvað sum ein brandur. Í septembur vann hon á fyrsta sinni á Garry Kasparov í einum kviktalvi (25. min. hvør til talvið), tá heimurin vann á Russlandi í serligum kviktalvsdysti. Í oktober/novembur varð hon álitið á ungarska landsliðnum í Talvolympiaduni í Bled, Slovenia, við frálíkum úrslitum á øðrum borði aftanfyri Peter Leko. Tað viðførdi at hon rakk teimum 2700 á altjóða ratinglistanum hjá Fide, og er í løtuni nr. 13 í heiminum. Kasparov vann sær 9 ratingstig í OL, og hevur nú 2847.

Undan talvinum móti Anatoly Karpov í Wijk aan Zee, sum í hesum døgur verður leikt, hevði Polgar ikki fyrr megnað at koppa honum. Síðani summar hevur hon sostatt vunnið á Kasparov, 2700 í rating, og nú eisini vunnið á legenduni Karpov.

Støðan í toppinum í Wijk aan zee er annars hendan: 1-2. Anand, Loek van Wely 5/7. 3-4. Polgar, Shirov 4,5. 5. Grischuk 4. 6-8. Kramnik, Topalov og Ivanchuk 3,5. Seks umfør resta í.

**GM Anatoly Karpov 2688 — GM Judit Polgar 2700**
Wijk aan Zee (4), 2003

**1.d4 Rif6 2.Rif3 e6 3.c4 b6 4.a3 Bb7 5.Ric3 d5 6.cxd5 Rixd5 7.Fc2 Rixc3 8.Fxc3 h6 9.e3 Rid7 10.b4 Be7 11.Bb2 0—0 12.Rd1 a5** (helst ein teoretisk nýggjheit. Í øllum førum forvirraði leikurin gamla meistaran almikið, sum Polgar tók til eftir talvið) **13.b5 Rc8 14.Fb3 c6 15.bxc6 Bxc6** (svartur hevur nú lítlan fyrimun. Fólkini eru øll hampiliga væl útviklaði, rókurin er komin í leikin og kongurin er tryggur) **16.Bb5?** (Karpov yvirsáð næsta leikin hjá Polgar) **16...Bb4+! 17.axb4 Bxb5 18.bxa5 Bc4 19.Fa3 bxa5** (svartur hevur nærmast vinnandi fyrimun. Kongurin stendur sum nú er als ikki nóg tryggur, og í borg sleppur hann ikki) **20.Fd6 Bb5 21.d5 Rc2! 22.Rd2 Fc8** (22...Rxd2 er eisini væl møguligt) 23.Fa3 (svartur hótti Rxb2 og Fc1+) **23...Rxd2 24.Kxd2 Rib6 25.Fc3 Ric4+ 26.Kc2 e5 27.Kb1**



**Fg4** (leypur á á báðum síðum) **28.Rc1 Rb8 29.Rc2 f6** tryggleiki framum alt, man Polgar hava hugsað her. Leikurin tykist ikki at vera bráneyðugur, men hinvegin, hvat skal Karpov gera? Polgar hevur tíð til bíðileikir) **30.d6 Fxg2 31.Rid2 Fh1+ 32.Ka2 Rixd6 33.Fc5 Rc8** og Karpov gavst í hesari vónleysari støðu **0—1**

**Ólavur Simonsen — IM John Rødgaard**
FM-lið 2002/03 VT-KTF (5), 19.01.2003

1.e4 e6 2.d4 d5 3.Rid2 Rif6 4.e5 Rifd7 5.Bd3 c5 6.c3 Ric6 7.Rigf3 f6 8.exf6 Rixf6 9.0—0 cxd4 10.cxd4 Bd6 11.Re1 0—0 12.Rif1 Fb6 13.Rig3 Bd7 14.Bg5 Rig4 15.Be3 g6 16.Rig5 Rixe3 17.fxe3 Rie7 18.Fg4 Bxg3 19.Fxg3 Kg7 20.Rf1 Rae8 21.Fe5+ Kg8 22.Rf6 Ric6 23.Rxf8+ Rxf8 24.Fd6 Fxb2 25.Rf1 Rxf1+ 26.Bxf1 Fd2 27.Ff4 Rid8 28.h4 Fb4 29.Ff6 Ff8 30.Rixh7 Fe8 31.Rig5 Ric6 32.Bd3 Rie7 33.h5 Rif5 34.hxg6 Rid6 35.g7 Rif5 36.Bxf5 exf5 37.Kf2 f4 38.e4 dxe4 39.Fh6 e3+ 40.Ke1 1—0

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 2 | 1 - 1 - 0 | 325 | 258 | 67 | 11 |
| 2 | VB | 1 | 1 - 0 - 0 | 337 | 283 | 54 | 11 |
| 3 | Stjørnan | 1 | 0 - 0 - 1 | 277 | 281 | -4 | 8 |
| 4 | StÍF | 2 | 0 - 1 - 1 | 324 | 352 | -28 | 7 |
| 5 | Kyndil | 0 | 0 - 0 - 0 | 294 | 293 | 1 | 6 |
| 6 | Neistin | 1 | 0 - 0 - 1 | 259 | 279 | -20 | 5 |
| 7 | Tjaldur | 1 | 1 - 0 - 0 | 263 | 333 | -70 | 3 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v - t | sett | sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 13 | 11 - 2 | 37 | 15 | 22 | 14 |
| 2 | Mjølnir | 13 | 10 - 3 | 34 | 13 | 21 | 13 |
| 3 | TB | 13 | 9 - 4 | 32 | 15 | 17 | 10 |
| 4 | Dráttur | 13 | 5 - 8 | 20 | 32 | -12 | 5 |
| 5 | Fleyr | 13 | 3 - 10 | 12 | 32 | -20 | 5 |
| 6 | KÍF | 13 | 1 - 12 | 8 | 36 | -28 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 10 | 10 - 0 | 30 | 2 | 28 | 12 |
| 2 | Fram | 10 | 6 - 4 | 22 | 14 | 8 | 8 |
| 3 | SÍ | 11 | 5 - 6 | 17 | 20 | -3 | 7 |
| 4 | Mjølnir | 10 | 5 - 5 | 18 | 18 | 0 | 5 |
| 5 | Fleyr | 11 | 0 - 11 | 0 | 33 | -33 | 0 |